gult26 cyan26 magenta26 svart26

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Service-maður

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi service-manni (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir um eftirlit við entreprenør-maskinunum hjá Landsverkfrøðinginum, sum eru í arbeiði kring landið, og umvæla møgulig smábrek á hesar.

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal verða maskinsmiðjur, bil-mekanikari ella hava líknandi útbúgving, og má hava – ella skal taka – stóra koyrikortið fyri at kunna koyra service-bilin. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin harafturat hevur kunnleiki til ella royndir við umvæling av maskinamboðum.

Setanarviðurviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært av-varðandi yrkissáttmála ella sambært avtalu. Roknast kann við nakað av yvirtíð.

Umsóknir
Umsóknir verða at senda

Landsverkfrøðinginum
Postboks 78
110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi seinasta lagi 10. juli 2001. Merkið brævbjálvan »Umsókn eftir service-manni«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 422420 og tosa við Dánjal Andreasen, leiðara av maskindeildini.

Mentamálastýrið
Fólkaskúladeildin

Í fólkaskúlanum eru niðanfyri nevndu lærarastørv eru leys at søkja til setanar **1. august 2001.**

Fugloyar kommuna: 1 útoyggjalærari

Norðoya skúladømi I: Klaksvíkar, Hvannasunds, Viðareiðis og Kunoyar kommunur
Kunoyar kommuna: Kunoyar skúli: 1 einalærari

Streymoyar skúladømi II: Kommunur, ið eru saman um Felagsskúlan á Oyrarbakka:
Haldórsvíkar kommuna: Tjørnuvíkar skúli: 1 einalærari
Hvalvíkar kommuna: 2 lærarar

Hest kommuna: 1 útoyggjalærari

Har einki tímatal er viðmerkt, verður roknað við fullum tímatali.

r e kakr
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

Lønar- og setanartreytir
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum, Fólkaskúladeildin, við starvsstaði í nevnda skúladømi og við fyribils tænastu í nevnda skúla/nevndu skúlum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari framman-undan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

kn r
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal verða send **Mentamálastýrinum, Hoyvíksvegur 72, postrúm 3279, 110 Tórshavn**, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Mentamálastýrinum **í hendi í seinasta lagi 17. juli 2001**. Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av próvbrævi og møguligum viðmælum.

Teir umsøkjarar, ið søkja størv í fleiri kommunum, mega skriva eina umsókn til hvørt starv, ið søkt verður.

Tórshavn, 6. juli 2001

Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 – 110 Tórshavn
Telefon 355050 – Fax 355055 – e-postur: MMS@MMS.fo

Men a a r *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

Morgunmatur á Café Natúr

mánad.- leygard. kl. 09.00 til 11.00

Morgunbreyð v/ viðskera, kaffi/te		30,-
Cornflakes v/ rosinum & frukt		22,-
Jogurt v/ músli		22,-
Heit croissant		12,-
Heit croissant v/ sjokulátu, osti ella marcipan		15,-
Súreplaterta v/ róma ella súrróma		25,-
Mjólk		10,-
Juice		15,-
Kaffi — kann fyllast uppaftur ókeypis!	kopp	12,-
Te — kann fyllast uppaftur ókeypis!	kopp	10,-

CAFÉ NATÚR

livandi tónleikur — **Tlf. 31 26 25**

Sundalagsstevnan 2001
5. - 8. juni

Vit nýta høvi, at lýsa við bussambandi, sum er fyri-skipað í samstarvi við náttarbussin, sum koyrir í Sundalagnum. Koyrt verður eftir niðanfyristand-andi ferðaætlan.

Tórshavn-Hvalvík		Eiði-Hvalvík		Tjørnuvík-Hvalvík	
Farstøðin	22.30	Eiði	23.40	Tjørnuvík	23.30
Signabø	23.00	Norðskáli	23.50	Haldarsvík	23.40
Hósvík	23.15	Oyri	24.00	Langasandur	23.45

Hvalvík-Tórshavn		Hvalvík-Eiði		Hvalvík-Tjørnuvík	
Úr Hvalvík	05.00	Úr Hvalvík	04.15	Úr Hvalvík	04.15

Ferðaætlanin er galdandi bæði fríggjkvøld og leyg-arkvøld.

Við hesum vilja vit bjóða øllum vælkomin á

Hús í Eysturbýnum

Stór sethús í Eysturbýnum til sølu um nóg høgt boð fæst. Húsini eru í 3 hæddum og 350 m² tilsamans. Grundøkið er ca. 600 m².

Prísur undir 1,8 mill. ongan áhuga.

Møguliga kunnu minni hús í góðum standi ganga inn í keypið. Skriva til:

Sosialurin
Box 76
FO-110 Tórshavn
Bill.mrk. 128-1

Sosialurin
-tað loysir seg

gult27 cyan27 magenta27 svart27

Stjóri til fiskavirki

Søkt verður eftir stjóra til fiskavirkið P/f. Vaðhorn Seafood á Strondum.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og holla vitan um fiskaframleiðslu.

Fyri tann rætta persónin kunnu vit bjóða eitt áhugavert og avbjóðandi starv, har tú, saman við dugnaligum starvsfólkum kanst vera við til at menna eitt gott arbeiðspláss.

Vit vænta at tú:

- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur áhuga í at skapa úrslit

Løn verður ásett eftir nærri avtalu.

Umsóknir skulu sendast til Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, áðrenn 16. juli 2001, har eisini meir fæst at vita um starvið.

Sp/f Grannskoðarastovan á Skála
Eyðbjørg Thorleifsson · Páll Højgaard
Civiløkonomar og skrásettir grannskoðarar FRR
Tlf. 441666 · 480 Skála

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Fólk til Marknaðardeildina

Atlantic Airways sóknast eftir einum starvsfólki til marknaðarføring og sølu.

Atlantic Airways er eitt flogfelag í støðugum vøkstri, og fær marknaðardeildin tískil alsamt fleiri uppgávur at taka sær av. Soleiðis skalt tú millum annað verða við til at fyrireika og marknaðarføra støðugt fleiri nýggj ferðatilboð til okkara viðskiftafólk.

Tú hevur góð skapandi evnir, og tú dugir at loysa skiftandi og fjølbroyttar uppgávur. Harumframt hevur tú kunnleika til marknaðarføring og sølu. Tú ert ein royndur brúkari av Amadeus og øllum teimum vanligu telduforritunum og hevur góðan málkunnleika. Í sambandi við arbeiði kemur tú eisini at ferðast uttanlands.

Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juli, og starvið verður sett skjótast gjørligt.

Lønin verður eftir avtalu.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kent Christensen á tlf. 34 10 40.

Atlantic Airways
Sølu- og Marknaðardeildin
FO-380 Sørvágur

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

Kaðalmontørur til Føroya Tele í Kollafirði

"Skifta vit ikki kós, enda vit helst har, vit stýra!"
Kinesiskt orðatak



Søkt verður eftir kaðalmontøri til Føroya Tele í Kollafirði at byrja 1. september 2001 ella skjótast gjørligt. Á Føroya Tele í Kollafirði starvast íalt 6 fólk. Fólkið søkt verður eftir, skal í stóran mun arbeiða við nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:

- nýgerð og viðlíkahald av kaðal-netinum og telefoninstallatiónum
- vekslarar og teleterminalar
- internet og ISDN
- vanliga telefonútgerð
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanir
- skráseting av kaðalneti
- at ráðgeva viðskiftafólk um felaga-útgerð og tænastur
- annað fyrifallandi

Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:
Elektronikmekkanikari, elektrikari og/ella hollar viðkomandi royndir.

Arbeitt verður í Norðurstreymoy og Norðureysturoy. Uppmøtingarstaður er hjá Føroya Tele í Kollafirði.

Starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða opin, duga væl at samstarva og tosa við viðskifta-fólk. Eisini vænta vit EDV-førleika á brúkarastøði.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmanna-felagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Andreasen, økisleiðari tel. 421000 ella Starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 20. juli 2001

Umsóknir skulu sendast til
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!